# Torkils døtur

Torkil eigur sær døtur tvær,
*– at dansa –*
leingi á morgni svóvu tær,
*– væl er mær ansað,*
*har vil eg á gólvið fram at dansa,*
*hóast tú vilt mær lív í vanda,*
*væl er mær ansað.*

2. Tær svóvu sær so leingi,
til sól skein á teirra seingir.

3. Tær sova sær so leingi á dag,
til sól skín á teirra seingjarstað.

4. Torkil gongur til búðar,
vekir upp døtur prúðar.

5. “Statt upp, Katrin dóttir mín,
kirkjumaðurin bíðar tín!”

6. ”Vil hann ikki bíða,
bið hann undan ríða!”

7. Katrin setst á seingir,
klæðist væl og leingi.

8. Hon fór í ein silkiserk,
níggju moyggja handaverk.

9. Uttan yvir møttulin blá
gull eftir hvørjum seymi lá.

10. Katrin setst á songarstokk,
hon fór í ein skarlakssokk.

11. Skarlakssokk og búgvin skó,
hvítar hendur í vatni tvó.

12. Hon tók til sín góða gullkamb,
kembir sítt hár við silkiband.

13. Kembir sítt hár við silki smá,
gullkrúnu setir hon omaná.

14. Katrin gongur í rossahús,
loysir hon tann gangara út.

15. Hon loysir út ein, hon loysir út tvá,
tann besta legði hon saðil á.

16. Har var eingin knektur hjá,
sjálv legði Katrin bokslið á.

17. Har var eingin knektur í lund,
sjálv legði Katrin boksl í munn.

18. Katrin reið eftir gøtuni fram,
tað glumdi, sum hennara gangari rann.

19. Tá ið hon kom har suður í líð,
møttu henni vallarar trír.

20. Tá ið hon kom har skamt ífrá,
møttu henni vallarar tvá.

21. Tá hon kom har mitt á leið,
møtti henni vallari ein.

22. “Hoyr tú, Katrin, eg tali til tín,
vilt tú vera mítt kvøldarvív?

23. Hvat vilt tú láta títt unga lív,
heldur enn vera mítt kvøldarvív?”

24. “Fyrr vil eg láta mítt unga lív,
heldur enn vera títt kvøldarvív.”

25. Vallarin sínum svørði brá,
hann hjó Katrina í luti tvá.

26. Har sum hennara blóðið dreiv,
tendraðist ljós á hvørjari leið.

27. Har sum hennara høvdið lá,
sprakk ein kelda við heilivág.

28. Har sum hennara bulurin lá,
reistist ein kirkja við krossi á.

29. Vallarin heim í garðin fór,
úti Torkil fyri honum stóð.

30. “Hoyr tú, vallarin, eg tali til tín,
sást tú ikki Katrin, dóttur mína?”

31. “Jú, fullvæl eg hana sá:
í Mariu kirkju var hon í gjár.

32. Torkil, Torkil, læna mær hús,
eg eri mær so sára sjúk!”

33. “Húsini eru til reiði,
um vallarar vóru fleiri.”

34. “Ása lítla, tendra ljós,
vallarin er til seingjar fús!”

35. Ása gongur til seingjar,
reiðir undir sjúkum dreingi.

36. “Ása lítla, sov hjá mær,
silkiserkin gevi eg tær!”

37. “Lat meg fyrst tann serkin sjá,
síðan skal eg tær sova hjá.”

38. Tá ið hon tann serkin sá,
systur merki kendi hon á.

39. “Ása lítla, sova hjá mær,
møttulin blá gevi eg tær.”

40. “Lat meg fyrst tann møttulin sjá,
síðan skal eg tær sova hjá.”

41. Tá ið hon tann møttulin sá,
systur merki kendi hon á.

42. “Ása lítla, sov hjá mær,
eina gullkrúnu gevi eg tær.”

43. “Lat meg fyrst ta gullkrúnu sjá,
síðan skal eg tær sova hjá.”

44. Tá ið hon ta gullkrúnu sá,
systur merki kendi hon á.

45. Ása smeldi hurð í gátt:
“Vallari, hav nú góða nátt!”

46. Ása gongur fyri faðir sín:
“Vallarin hevur dripið dóttur tín.”

47. “Hvør torir mær tey boð at bera,
ella hvør tordi tann gerning at gera?”

48. “Eg tori tær tey boð at bera,
vallarin tordi tann gerning gera.”

49. Torkil heitir á sveina tvá:
“Gangið á skóg og kyndið bál!

50. Gangið á skóg og kyndið bál,
har skal vallarin brenna á.”

51. Tað var um eina morguntíð,
vallarin brann í grønari líð.

52. Tað var um eina morgunstund,
vallarin brann á grønari grund.

Kvæðið er úr “Stígum fast” hjá Poul Eide, sum hevur tað úr tí stóru lesibókini hjá A.C. Evensen. jd.